# Námsskipan fyri
# MSc í Fólkaheilsu

Galdandi fyri lesandi byrjað eftir 1. august 2016.

## 1. Fororð til tey lesandi frá lestrarráðnum

Góðu lesandi

Ein námsskipan inniheldur grundreglurnar fyri tykkara lestur. Tí hevur tað alstóran týdning, at tit lesa og skilja hana. Saman við skeiðslýsingum og yvirskipaðum reglum hjá Setrinum, er námsskipanin eitt týðandi amboð, sum tit eiga at brúka. Á tann hátt kunnu tit kenna tykkara rættindi og tykkara skyldur.

Sambært viðtøkunum fyri lestrarráð skal lestrarráðið fáa uppskot til útbúgvingarprofilar og námsskipanir til viðgerðar og góðkenningar frá útbúgvingarleiðara, eftir at útbúgvingarleiðarin hevur fingið svar frá hoyringspørtum. Tá ið uppskot til námsskipan hevur verið viðgjørt og vissa er fingin fyri, at viðkomandi partar eru hoyrdir, góðkennir lestrarráðið námsskipanina og letur dekaninum hana til víðari avgreiðslu.

Lestrarráðið hevur eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman, og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið fyri útbúgvingina. Ráðið skal eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið við útbúgvingini.

Hendan námsskipanin er góðkend av forkvinnuni í Lestrarráðnum 20. juni 2019, og verður tikin upp á næsta fundi í Lestrarráðnum til endaliga góðkenning.

## 2. Innihaldsyvirlit


1. **Fororð til tey lesandi frá lestrarráðnum** ........ 2
2. **Innihaldsyvirlit** ........ 3
3. **Inngangur** ........ 5
4. **Yvirskipað endamál við útbúgvingini** ........ 5
5. **Upptøkutreytir** ........ 5
   - **5.1 Aðrir førleikar** ........ 5
   - **5.2 Avmarkingar viðvíkjandi upptøku av lesandi** ........ 5
6. **Útbúgvingarheitið** ........ 6
7. **Førleikar** ........ 6
   - **7.1 Fakligir og almennir førleikar** ........ 6
   - **7.2 Læruúrtøkur** ........ 7
   - **7.3 Starvsmøguleikar og víðari lesnaður** ........ 7
8. **Bygnaður og innihald í útbúgvingini** ........ 8
   - **8.1 Bygnaður** ........ 8
     - 8.1.1 Kravd skeið ........ 8
     - 8.1.2 Valfrí skeið ........ 8
     - 8.1.3 Ritgerðararbeiðið ........ 9
   - **8.2 Innihald í útbúgvingini** ........ 9
     - 8.2.1 Grundskeið í vísindaástøði og granskingarháttarløg ........ 9
     - 8.2.2 Fólkaheilsa, samfelag og mentan ........ 10
     - 8.2.3 Heilsugransking ........ 10
     - 8.2.4 Heilsunámsfrøði, fyribyrging og heilsufremjan ........ 10
     - 8.2.5 Valfrítt skeið: Grundskeið í hagfrøði ........ 10
     - 8.2.6 Valfrítt skeið: Epidemiologi ........ 10
     - 8.2.7 Valfrítt skeið: Kvalitativ granskingarháttaløg innan fólkaheilsuvísindi ........ 10
     - 8.2.8 Valfrítt skeið: Gerontologi ........ 11
     - 8.2.9 Valfrítt skeið: Immunologi og autoimmunar sjúkur ........ 11
     - 8.2.10 Valfrítt skeið: Neurodegenerativar sjúkur ........ 11
     - 8.2.11 Valfrítt skeið: Sálarlig heilsa í samfelagshøpi ........ 11
     - 8.2.12 Masterritgerð ........ 11
9. **Tíðarætlan fyri masterútbúgving í fólkaheilsu** ........ 12
   - **9.1 Tíðarætlan fyri útbúgvingina við hálvtíðarlestri** ........ 12
   - **9.2 Tíðarætlan fyri útbúgvingina við fulltíðarlestri** ........ 12
10. **Próvtøka og gongd í lesnaði** ........ 12
    - **10.1 Próvtalsstigi** ........ 13
    - **10.2 Próvdøming** ........ 14
    - **10.3 Próvtøkumál** ........ 14
    - **10.4 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka** ........ 14
    - **10.5 Frámelding til próvtøku** ........ 14
    - **10.6 Bólkaarbeiði** ........ 14
11. **Góðskriving** ........ 15

12. Lestrarvist ..... 15

13. Kærur ..... 15

14. Aðrar leiðreglur ..... 15
- 14.1 Farloyvi ..... 15
- 14.2 Útskriving ..... 16
- 14.3 Samskifti ..... 16
- 14.4 Námsstig og arbeiðstyngd ..... 16
- 14.5 Lestrarárið ..... 16

15. Treytir um broyting í námsskipan ..... 16

## 3. Inngangur

Í hesum skjali er námsskipanin fyri masterútbúgvingina í fólkaheilsu lýst. Við heimild í Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, og Kunngerð nr. 85 frá juni 2009 ásetur námsskipanin innihaldið í útbúgvingini og reglurnar fyri, hvussu útbúgvingin verður útint. Útbúgvingin fylgir somuleiðis Bolognayvirlýsingini um eina felags evropeiska útbúgvingarskipan, og er skipað eftir hesum leisti. Námsskipanin inniheldur ikki skeiðslýsingar fyri tey einstøku skeiðini, og heldur ikki almennar reglur hjá Setrinum. Hesar eru at finna á heimasíðu Setursins.

## 4. Yvirskipað endamál við útbúgvingini

Masterútbúgvingin í Fólkaheilsu er normerað til 120 ECTS, og hevur til endamáls at geva føroyskum almanna- og heilsustarvsfólki førleikar at røkja størv innan almanna- og heilsuverk, ið krevja perspektiv og refleksión innan fólkaheilsu, servitan og greinandi førleika á masterstigi, herundir deildarleiðara- og leiðarastørv. Harumframt verður miðað ímóti at førleikamenna tey lesandi, so at tey gerast før fyri at seta í verk granskingarverkætlanir, ella gerast partur av størri granskingarverkætlanum, innan almanna- og heilsufrøðini, og í spenningsfeltinum millum hesi øki.

## 5. Upptøkutreytir

Treytirnar fyri upptøku eru, at tann lesandi hevur staðið miðallanga útbúgving sum bachelor ella professiónsbachelor á heilsu- ella almannaøkinum, eitt nú sum sjúkrarøktarfrøðingur, námsfrøðingur, ljósmóðir, sosialráðgevi, lærari, ergoterapeutur, fysioterapeutur, samfelagsfrøðingur, bioanalytikari o.a. Nærri meting verður gjørd av útbúgvingarleiðara og dekani í hvørjum einstøkum føri.

### 5.1 Aðrir førleikar

Umframt treytirnar viðvíkjandi útbúgving mugu lesandi vera før fyri at lesa og skilja tekstir á føroyskum, enskum, norskum, svenskum og donskum. Herumframt skulu tey vera før fyri at skriva uppgávur, herundir masterritgerð, á einum av nevndu málunum.

### 5.2 Avmarkingar viðvíkjandi upptøku av lesandi

Upptøka av lesandi er annaðhvørt ár. Eitt avmarkað tal av lesandi verða upptikin til útbúgvingina. Talið av lesandi, ið verða upptikin, verður avgjørt annaðhvørt ár innan upptøku, og er treytað av karmunum hjá Fróðskaparsetri Føroya. Í løtuni er upptøkan 24 lesandi, í einum flokki.
Um tað eru fleiri umsøkjarar enn tað ber til at taka inn til útbúgvingina verður raðfest millum umsøkjararnar. Raðfesting verður gjørd út frá meting av førleikunum hjá umsøkjarunum at gjøgnumføra útbúgvingina, herundir viðkomandi eftirútbúgving og staðin stakskeið so sum vísindaástøði og háttaløg og onnur relevant fak; umframt viðkomandi praktiskar royndir við verkætlanum og gransking. Tað er útbúgvingarleiðarin, ið hevur ábyrgd av hesari raðfesting.

## 6. Útbúgvingarheitið

Masternámið gevur rætt til heitið Master í Fólkaheilsu, stytt MSc í Fólkaheilsu (á enskum: Master of Science in Public Health, stytt MSc in Public Health).

## 7. Førleikar

Eftir lokna útbúgving hevur lesandi hesar førleikar: lesandi fær við masterútbúgvingini í fólkaheilsu holla vitan í heilsuvísindum, háttalagsfrøði og heilsugransking, samfelagsviðurskiftum og heilsu, fyribyrging og heilsuframa. Av tí at fólkaheilsufrøðin er eitt tvørfakligt øki, fatar hon um fleiri ymiskar vísindagreinir og dentur verður lagdur á samanspælið millum hesar vísindagreinir.
Masterútbúgvingin í fólkaheilsu hevur sum serligt eyðkenni eitt felags fakligt grundarlag í tvørvísindaliga økinum fólkaheilsufrøði, ið við valskeiðum ger tað møguligt hjá lesandi at skapa sær sín egna fakliga profil.
Tvørvísindaliga tilgongdin merkir, at dentur er á ástøðilig og háttalagsfrøðilig innlit frá fleiri heilsu- og samfelagsvísindaligum siðvenjum. Haraftrat er serligt eyðkenni, at áherðsla verður løgd á Føroyar sum ‘small-scale society’ í undirvísingini.

### 7.1 Fakligir og almennir førleikar

Eftir lokna útbúgving hevur lesandi hesar fakligu og almennu førleikar:

Fakligir førleikar

- **Fólkaheilsa, tvørvísindalig vitan:** Kenna bakgrundina og hugsanina sum fólkaheilsa sum tvørvísindalig vísindagrein byggir upp á, duga at staðfesta og áseta fólkaheilsutrupulleikar/avbjóðingar, umframt førleika til at meta um fólkaheilsu á skikkaðan hátt.
- **Analytisk evni:** Greina og meta umhvørvisárin á heilsu í samfelagnum, í serstøkum samfelagsbólkum, og orða hættir at handfara og røkka einstaklingum og samfelagsbólkum við heilsuátøkum.
- **Sjálvstøðugar avgerðir:** Nýta granskingarhegni og vísindaliga vitan/data munadygt; kunna sniðgeva, menna og meta um menningarætlanir og granskingarverkætlanir, grundaðar á viðkomandi háttaløg og haldgóða vísindaliga prófførslu.
- **Leiða og samstarva:** Før/ur fyri við servitan í fólkaheilsu at samstarva við einstaklingar og í toymum við starvsfelagar/javnlíkar og aðrar fakbólkar við atliti at heilsufremjandi og fyribyrgjandi arbeiði og at menna egið fakøki við atlit til hesi.
- **Meta og menna:** Førleika til skilagott at meta um, áseta og útinna dygd og trygd í heilsurøkt; at mynda, seta í verk og meta um heilsupolitikk og –tiltøk/skipanir; at fyrireika, íverkseta og meta um fyribyrgjandi skipanir/átøk.

Almennir førleikar

- **Akademiskt arbeiðslag:** Arbeiða á einum víðkaðum stigi, t.e. sjálvstøðugt kunna problematisera, viðgera, greina og tulka spurdómar á egnum fakøki; at meta og brúka vísindalig ástøði og háttaløg, ið verða nýtt á fakøkinum, fyri at koma fram til nýggja vitan og niðurstøðu.

- **Kritiskar og sjálvkritiskar førleikar:** Staðfesta og orða ein trupulleikagrundaðan spurdóm, viðgera spurdómin við at nýta skikkaða vísindaliga vitan/data og háttaløg, og koma fram til sjálvstøðuga, kritiska støðutakan og leiðslu á virkisøkinum.
- **Málsligar førleikar**: Orða seg nágreiniliga, bæði munnliga og skrivliga; skilja og nýta vísindaligt mál á masterstigi, t.e. eisini á enskum.
- **Samskiftisførleikar:** Samskifta í hóskandi samsvari við samskiftisstøðuna (óformelt, formelt, vísindaligt), herundir eisini miðla nýggja vitan bæði munnliga og skrivliga; í plenum eins og í minni forum.
- **Toymis-arbeiðslag:** Arbeiða munadygt sum partur av einum bólki og einum fjølbroyttum toymi, nýta hegni at loysa trupulleikar til at granska ymiskar hugsaðar støður.
- **Sjálvstøðugt arbeiðslag:** Samskipa fjøltáttaðar lutir, t.e. samantvinna úrslit av ymiskum kanningum og greiningum og við hesum koma fram til ávísa syntesu, við neyvum atliti at evnis- og tíðaravmarking.

## 7.2 Læruúrtøkur

Eftir loknan lestur er lesandi før/ur fyri at

- Á víðkaðum stigi at nýta fólkaheilsuvísindaliga vitan í verki.
- Greiða frá fólkaheilsu sum vísindagrundað tvørfakligt hugtak.
- Greina samspælið millum samfelagslig viðurskifti og fólkaheilsu.
- Greina høvuðstættir og avbjóðingar í fólkaheilsu bæði í altjóða og tjóða høpi.
- Greina og meta um altjóða og tjóða fólkaheilsuátøk.
- Meta um úrslit frá vísindaligum kanningum av fólkaheilsu og fyribyrging.
- Greiða frá, meta um og kunna nýta mest nýttu vísindaligu háttaløgini í fólkaheilsugransking.
- Meta um granskingarúrslit úr vísindaligum kanningum í fólkaheilsu, ið nýta epidemiologisk og hagfrøðilig háttaløg.
- Víðkaðar førleikar at nýta ástøði og háttarløg á egnum fakøki.
- Víðkaðar førleikar til at gera og nágreiniliga kanna spurdómsgrundaðar arbeiðstilgongdir sjálvstøðugt og harvið røkka fakligari dýpd og sjálvstøðugum avriki.
- At vísa førleika at lýsa spurdómar úr fleiri sjónarhornum, greina og seta fram týðandi vitan á egnum fakøki og evni.
- at arbeiða spurdómsgrundað og tvørvísindaliga á einum høgum fakligum stigi.
- duga at vera partur av einum arbeiðsbólki umframt at vísa hegni til at leiða slíkar arbeiðsbólkar.
- at bera fram og miðla gransking og granskingargrundaða vitan, at kjakast bæði við fakfelagar og onnur, ið ikki eru serkøn á økinum, um hesi viðurskifti.
- Við støði í viðkomandi fakøki, teimum førleikum, ið hetta gevur, sjálvstøðugt og við tvørfakligum og tvørvísindaligum grundarlagi at røkja serligar og torgreiddar arbeiðsuppgávur í tí almenna/heilsufakliga geiranum ella í almannagagnligum viðurskiftum, ella í tí privata vinnulívinum við atliti at fólkaheilsu.

## 7.3 Starvsmøguleikar og víðari lestur

Masterútbúgvingin í Fólkaheilsu gevur lesandi førleikar til leiðandi størv í heilsuverkinum, herundir serliga í kommunalum høpi, og í almennaverkinum, sum leiðari av størri eindum ella toymum tað veri seg innan kliniskum ella samskipandi/professionellum heilsuarbeiði. Útbúgvingin gevur førleikar til víðari

lestur á ph.d.-stigi (Third Cycle Programmes), umframt víðari lestur í leiðslu og serøkisútbúgvingar og – skeið.

## 8. Bygnaður og innihald í útbúgvingini

Útbúgvingin í Fólkaheilsu tekur 2 ár skipað sum fulltíðarlestur, 4 ár skipað sum hálvtíðarlestur. Hvørt lestrarár er býtt í tvær lestrarhálvur (semestur), á 30 ECTS við fulltíðarlestri, 15 ECTS við hálvtíðarlestri. Tilsamans eru sostatt 4 lestrarhálvur við fulltíðarlestri, 8 við hálvtíðarlestri. Av tí at útbúgvingin at byrja við bert var skipað sum hálvtíðarlestur, verða hesar 8 hálvtíðarlestrarhálvurnar nevndar 'eindir'. Hvør eind er í høvuðsheitum skipað sum 7,5 ECTS ella 15 ECTS skeið.

### 8.1 Bygnaður

Lesturin er skipaður í tveir høvuðstættir, skeið og ritgerð, soleiðis at tey lesandi hvørja lestrarhálvu fáa undirvísing á vísindaliga fakøkinum, umframt at tey sjálvstøðugt skriva eina spurdómsstýrda masterritgerð.
Eindirnar eru skipaðar antin sum kravd skeið (eind 1,2,3,5), ella valskeið (eind 4,6).
Í seinastu eindunum (7 og 8) verður masterritgerðin skrivað.

#### 8.1.1 Kravd skeið

Í fyrstu eind hava tey lesandi undirvísing í vísindaástøði og háttaløgum, og dentur verður lagdur á, at lesandi nema sær hollan kunnleika til ástøði undir kvantitativum og kvalitativum háttaløgum, og eru før fyri at seta fram eitt uppskot til eina verkætlan á teirra fakøki.
Onnur eind fevnir víða; um fólkaheilsuvísindi, samfelagsviðurskifti, livikor og heilsu. Dentur verður lagdur á sjónarmið á og mát fyri heilsu og sjúku og menniskjans samspæl við heilsuligar avbjóðingar og samfelagsligar treytir gjøgnum tíðina, og ávirkanina á fólkaheilsuna.
Í eind 3 verður sjóneykan sett á gransking í fólkaheilsu, við serligum atliti at føroyskari gransking. Her verður arbeitt við at víðka vitanina um og fatanina av háttalagsfrøðini, og lesandi nema sær førleika til hagfrøðiliga greining av smærri dátutilfari. Umframt at verða undirvíst í ítøkiligum dømum úr gransking, menna lesandi sjálvstøðuga granskingarprotokoll í fólkaheilsu við viðkomandi háttalagi.
Eind 5 viðger evnisøkini heilsunámsfrøði, fyribyrging og heilsuframa. Dentur er lagdur á teir tættir, ið atlit skal havast at, tá miðað verður móti at ávirka og stimbra heilsuna hjá einstaka menniskjanum, og hjá bólkum, ið kunnu vera í serligum vanda fyri at gerast sjúk, til dømis orsakað av samfelags- og umhvørvisárinum, kostvanum, rørslu, aðrari heilsuatferð v.m.

#### 8.1.2 Valskeið

Endamálið við valfríu eindunum er at lesandi sjálvi kunnu skapa sær sín egna útbúgvingarprofil, í tann mun hon/hann ynskir at styrkja ávísar partar av sínum førleikum; til dømis á professións- ella kliniska økinum har hon/hann er í starvi; við háttarløgum, ið ynski er at fara undir at brúka í ritgerðararbeiðinum; ella eftir øðrum áhugamáli, ið kann styrkja júst tann útbúgvingarprofilin, ið lesandi vil menna.
Skeið á masterstigi, ið hava verið boðin út á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi sum valskeið í tilknýti til útbúgvingina, eru: 'Grundskeið í hagfrøði', 'Epidemiologi', 'Kvalitativ granskingarháttaløg í fólkaheilsuvísindum', 'Gerontologi', 'Immunologi og autoimmunar sjúkur', 'Neurodegenerativar sjúkur', 'Sálarlig heilsa í samfelagshøpi'.

Skeið kunnu verða tikin á Fróðskaparsetrinum, bæði á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi, men eisini á øðrum deildum, í tann mun útbúgvingarleiðarin metir at tey kunnu innganga í útbúgvingina.

Undangóðkenning skal í hvørjum føri søkjast fyri skeið á øðrum deildum, og hetta skal játtast frá útbúgvingarleiðara og lestrarráðnum á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi.
Somuleiðis kunnu lesandi taka skeið á øðrum universitetum, undir somu fortreytum sum fyri skeið, ið verða tikin á øðrum deildum á Fróðskaparsetrinum: Undangóðkenning skal í hvørjum føri søkjast fyri skeið á øðrum deildum, og hetta skal játtast frá útbúgvingarleiðara og lestraráðnum á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi.

### 8.1.3 Ritgerðararbeiðið

Endamálið við ritgerðini er, at lesandi mennir og vísir førleika til sjálvstøðugt at nýta ástøði og háttaløg, sum lesandi hevur nomið sær í masterútbúgvingini í fólkaheilsu, við at fremja í verki kanning av einum sjálvvaldum spurdómi í fólkaheilsu, ið hevur bæði fakligan og samfelagsligan týdning.

Lesturin verður skipaður soleiðis:

| 1. eind | 2. eind | 3. eind | 4. eind | 5. eind | 6. eind | 7. /8. eind |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Grundskeið í vísinda-ástøði og granskingar-háttaløgum 15 ECTS | Fólkaheilsa, samfelag og mentan 15 ECTS | Heilsu-námsfrøði, fyribyrging og heilsuframi 15 ECTS | Valfrí skeið 15 ECTS | Heilsu-gransking 15 ECTS | Valfrí skeið 15 ECTS | Master-ritgerð 30 ECTS |

## 8.2 Innihald í útbúgvingini

Fakliga innihaldið í útbúgvingini er nágreiniliga lýst í skeiðslýsingum og í pensumlistunum, sum eru tøk á heimasíðu Setursins. Skeiðslýsingar innihalda upplýsingar um: skeiðsnummar, heiti, ECTS-námstig, fortreytir, stig, endamál við skeiðinum, innihald, læru- og undirvísingarhættir, læruúrtøka, próvtøkuháttur, próvdøming, próvtalsstigi, lestrarlisti, og ábyrgdarhavi. Pensumlistin er uppgivin í sambandi við undirvísingarskránna fyri skeiðið, og inniheldur upplýsingar um hvørjar bøkur, greinar og onnur verk, ið verða nýtt í undirvísingini.

Undirvísingin er skipað sum fyrilestrar, kjak, bólkaarbeiði, venjingar, heimauppgávur og verkætlanararbeiði, og er lýst í skeiðslýsingunum. Niðanfyri er innihaldið í útbúgvingini lýst við styttri vegleiðandi endamálslýsingum.

### 8.2.1 Grundskeið í vísindaástøði og granskingarháttarløgum

Endamálið við skeiðinum er, at lesandi ogna sær innlit í og vitan um ymisku vísindaligu greinirnar; at tey

skilja týdningin av valdum tilgongdum í mun til fólkaheilsuvísindaliga gransking og ogna sær vitan um og førleika til at arbeiða við kvalitativum og kvantitativum háttaløgum í fólkaheilsu á masterstigi. Samlað læra lesandi at brúka hesa vitan og førleikar til at menna sjálvstøðugt uppskot til granskingarprotokoll fyri kanning í fólkaheilsu við hóskandi háttalagi.

### 8.2.2 Fólkaheilsa, samfelag og mentan

Endamálið við skeiðinum er, at lesandi fáa eina breiða vitan um fólkaheilsu, heilsupolitikk, samfelagslig og mentanarlig viðurskifti í Føroyum. Dentur verður serliga lagdur á hugtakið 'fólkaheilsa' frá einum søguligum sjónarhorni og á demografisku menningina í Føroyum; Føroyar sum vælferðarsamfelag, og heilsupolitikkur, lógarviðurskifti og mentan við atliti at heilsu, alt við Føroyum sum 'small scale society' í miðdeplinum.

### 8.2.3 Heilsugransking

Endamálið við skeiðinum er at lesandi fáa vísindagrundaða vitan um føroyska gransking í fólkaheilsu og menna førleikar til at meta um og menna uppskot til nýggja granskingarverkætlan. Lesandi verða undirvíst í ymiskum sløgum av heilsugranskingarverkætlanum, hvussu slíkar verða lagdar til rættis, etisk viðurskifti í sambandi við heilsugransking, og tey læra at brúka hagfrøðiliga greining til at arbeiða við dátutilfari og koma fram til niðurstøður.

### 8.2.4 Heilsunámsfrøði, fyribyrging og heilsuframi

Endamálið við skeiðinum er, at lesandi ogna sær vísindagrundaða vitan um, og førleikar til, út frá einum heilsunámsfrøðiligum sjónarhorni at greina viðurskifti, ið hava týdning fyri heilsu og heilsuatferð. Út frá ástøði um heilsunámsfrøði, fyribyrging og heilsuframa læra lesandi at menna uppskot til heilsufremjandi ella sjúkufyribyrgjandi tiltøk, og at greina heilsuspurningar út frá einum kontekstuellum sjónarmiði.

### 8.2.5 Valskeið: Grundskeið í hagfrøði

Endamálið við skeiðinum er at lesandi ogna sær vitan um kjarnulutir í hagfrøði sum háttalag í fólkaheilsuvísindaligari gransking, og førleika at greina hagfrøðilig viðurskifti. Herumframt læra lesandi at skyna millum og brúka deskriptiva og analytiska hagfrøði, menna praktiskar førleikar at brúka hagfrøði sum háttalag við atliti at granskingarverkætlan á egnum áhugaøki/fakøki, og at meta um hagfrøðiligar analysur í vísindaligum arbeiði.

### 8.2.6 Valskeið: Epidemiologi

Endamálið við skeiðinum er at lesandi ogna sær vitan um kjarnulutir í epidemiologiini og førleika at greina viðurskifti í epidemiologiini. Herumframt menna lesandi førleika til kritiskt at lesa og meta um vísindaligar epidemiologiskar tekstir og læra at brúka epidemiologi sum háttalag við atliti at granskingarverkætlan á egnum áhugaøki/arbeiðsøki.

### 8.2.7 Valskeið: Kvalitativ granskingarháttaløg í fólkaheilsuvísindum

Endamálið við skeiðinum er at lesandi læra at skilja týdningin av vísindaástøði sum grundgeving fyri val av kvalitativum háttaløgum; at tey menna førleika at arbeiða við kvalitativum háttaløgum í heilsuvísindum á master-stigi, at meta vísindaligar greinar sum nýta kvalitativ háttaløg og at skriva eitt review um eitt sjálvvalt evni í fólkaheilsuvísindum.

### 8.2.8 Valskeið: Gerontologi

Endamálið við skeiðinum er at lesandi ogna sær vísindagrundaða vitan um, og førleika til, at greina týdningarmikil viðurskifti innan gerontologi, at menna heilsufremjandi og fyribyrgjandi tiltøk fyri eldri borgarar, og amboð at menna praksis á økinum í Føroyum.

### 8.2.9 Valskeið: Immunologi og autoimmunar sjúkur

Endamálið við skeiðinum er, at lesandi ogna sær grundleggjandi vitan um immunskipanina og autoimmunar sjúkur, og gerast før fyri at meta um og kjakast um fylgjur fyri fólkaheilsuna og lívsgóðsku av hesum sjúkum. Í einum breiðari sjónarringi skulu lesandi gerast før fyri meta um og brúka dygdarkeldur til vitan um immunologi og autoimmunar sjúkur.

### 8.2.10 Valskeið: Neurodegenerativar sjúkur

Endamálið við skeiðinum er, at lesandi ogna sær grundleggjandi vitan um neurodegenerativar sjúkur við serligum atliti at demensi, Parkinsons sjúku og sclerosu. Herumframt menna lesandi førleikar til at meta og kjakast um avleiðingar fyri fólkaheilsuna og árin á lívsgóðsku, ið standast av hesum sjúkum. Lesandi gerast før fyri at brúka og meta um dygdarkeldur til vitan um neurodegenerativar sjúkur.

### 8.2.11 Valskeið: Sálarlig heilsa í samfelagshøpi

Endamálið við skeiðinum er, at lesandi ogna sær vísindagrundaða vitan um, og førleika til, at viðgera spurdómar í sálarligari heilsu í samfelagshøpi. Umframt hetta ogna lesandi sær viðkomandi og hóskandi vitan um vísindagrundað amboð at menna praksis á økinum sálarlig heilsa í Føroyum; og førleika at menna heilsufremjandi og fyribyrgjandi tiltøk í mun til sálarliga heilsu hjá borgarum í samfelagnum.

### 8.2.12 Masterritgerð

Endamálið við masterritgerðini er, at lesandi tekur samanum lærdómin í útbúgvingini og skjalfestir sínar førleikar at greina og menna egið fakøki og at seta í verk kanningarverkætlan. Lesandi leggur sjálvstøðugt til rættis eina spurdómsstýrda kanning, har tey nýta faklig hugtøk og ástøði, fáa til vega empiriskt tilfar, gera eina sjálvstøðuga greining av hesum tilfari og koma til eina niðurstøðu, ið greitt svarar setta kanningarspurdóminum.

Lesandi kann eftir egnum vali antin skriva vanliga ritgerð ella velja at skriva eina vísindaliga grein.

Ritgerðin kann skrivast í bólki ella einsæris. Farið verður til próvtøku einsæris í masterritgerðini, hóast skrivliga arbeiðið verður avrikað í bólki.

Treytin fyri at fara til próvtøku í masterritgerðini er, at tann lesandi frammanundan hevur staðið øll onnur skeið á útbúgvingini (90 ECTS).

# 9. Tíðarætlan fyri masterútbúgving í fólkaheilsu

## 9.1 Tíðarætlan fyri útbúgvingina við hálvtíðarlestri

| **Lestrarhálva** / **Skeið og ritgerð** | 1. | 2. | 3. | 4. | 5. | 6. | 7. | 8. | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vísindaástøði og granskingarháttaløg | X | | | | | | | | 15 |
| Fólkaheilsa, samfelag og mentan | | X | | | | | | | 15 |
| Heilsugransking | | | X | | | | | | 15 |
| Valskeið | | | | X | | | | | 15* |
| Heilsunámsfrøði, fyribyrging og heilsuframi | | | | | X | | | | 15 |
| Valskeið | | | | | | X | | | 15* |
| Masterritgerð | | | | | | | X | X | 30 |
| *ECTS í alt* | | | | | | | | | *120* |

* ella multiplum av skeiðum, ið hvørt telja 5 ECTS, 7,5 ECTS, 10 ECTS

## 9.2 Tíðarætlan fyri útbúgvingina við fulltíðarlestri

| **Lestrarhálva** / **Skeið og ritgerð** | 1. | 2. | 3. | 4. | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|
| Vísindaástøði og granskingarháttaløg | X | | | | 15 |
| Fólkaheilsa, samfelag og mentan | | X | | | 15 |
| Heilsugransking | X | | | | 15 |
| Valskeið | | X | | | 15* |
| Heilsunámsfrøði, fyribyrging og heilsuframi | | | X | | 15 |
| Valskeið | | | X | | 15* |
| Masterritgerð | | | | X | 30 |
| *ECTS í alt* | | | | | *120* |

*ella multiplum av skeiðum, ið hvørt telja 5 ECTS, 7,5 ECTS, 10 ECTS

# 10. Próvtøka og gongd í lestri

Tá lesandi er upptikin á útbúgvingina skal eitt innskrivingarblað útfyllast og latast Letrarskrivstovuni. Tá hetta er gjørt, er lesandi samstundis innskrivað/ur til allar próvtøkurnar í útbúgvingini - undantikið valskeiðini. Áðrenn lestrarhálvurnar við valskeiðum byrja, skulu lesandi velja valskeið, og melda seg til skeiðið á skrivstovuni á deildini. Tá tey eru tilmeldað valskeiðið, verða tey samstundis eisini tilmeldað próvtøkuna.

Lesandi, sum hava verið í farloyvi, skulu, beinanvegin lesturin er uppafturtikin, melda seg til tey skeið, tey skulu hava, á skrivstovuni á deildini.

Próvtøka er í hvørjum skeiði sær og verður skipað sum eitt av niðanfyristandandi próvtøkusløgum ella

sum eina samanseting av hesum:

a) próvtøkuuppgáva við vegleiðing
b) munnlig próvtøka
c) skrivlig roynd
d) munnlig framløga, ið telur við í samlaða próvtalinum
e) skrivlig avrik (t.d. heimauppgávur, ritroyndir, ella synopsur), ið telja við í samlaða próvtalinum
f) munnlig próvtøka við støði í ritgerð
g) próvdøming av ritgerð

## 10.1 Próvtalsstigi

Próvdømingin verður givin sum próvtal eftir 7-talsstiganum[1], ella sum "staðið/ikki staðið". Fyri at hava staðið skeiðið krevst próvtalið 02. Próvtal verður givið soleiðis:

12: fyri framúr gott avrik.
Verður givið fyri avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini í lærugreinini.

10: fyri sera gott avrik
Verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini í námsætlanini í lærugreinini.

7: fyri gott avrik.
Verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

4: fyri hampiligt avrik.
Verður givið fyri hampiligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl í námsætlanini í lærugreinini.

02: fyri nøktandi avrik.
Verður givið fyri toluligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

00: fyri ikki nøktandi avrik.
Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

---

[1] Próvtalsstigin og hvussu hesin verður umsettur til enskt, og samanbering av 7-talsstiganum við 13-talsstigan, er nærri lýst í Kunngerð um próvtalsstiga og døming, Nr. 73, 31. mai 2013.

Galdandi reglur um próvtøkur eru at finna her: Kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum, Nr. 85, 9. juni 2009.

-3: fyri heilt vánaligt avrik.
Verður givið fyri heilt vánaligt avrik,
sum als ikki kann verða góðtikið.

## 10.2 Próvdøming

Próvdømingin kann antin verða við uttanseturs ella við innanseturs próvdómara. Tá próvdømingin er uttanseturs verður avrikið dømt av undirvísaranum og próvdómara, sum ikki er í starvi á Fróðskaparsetrinum. Uttanseturs próvdómarar skulu góðkennast av Mentamálaráðnum. Tá próvtøkan er innanseturs verður avrikið dømt av undirvísaranum og einum vísindastarvsfólki á Fróðskaparsetrinum.

## 10.3 Próvtøkumál

Próvtøkumálið er føroyskt. Tó kann próvtøkumálið vera annað skandinaviskt ella enskt mál, um lesandi, prógvhoyrari ella próvdómari ikki skilir føroyskt. Í slíkum førum tekur útbúgvingarleiðari avgerð um próvtøkumál.

## 10.4 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka

Lesandi kann í mesta lagi fara til próvtøku tríggjar ferðir í sama skeiði. Um skeiðið ikki verður staðið við fyrstu roynd, er møguligt at fara til endurpróvtøku tvær ferðir. Dekanurin kann geva loyvi um frávik frá hesari reglu eftir skrivligari umsókn, um serligar umstøður tala fyri tí. Um lesandi gerst sjúk/ur og ikki kann fara til próvtøku, er møguligt at fara til sjúkrapróvtøku. Fyri at fara til sjúkrapróvtøku krevst læknaváttan. Sjúkrapróvtøka telur ikki við sum endurpróvtøka.[2] Lesandi, sum ikki hevur staðið eitt kravt skeið í útbúgvingini eftir tríggjar royndir, hevur ikki møguleika at gjøgnumføra útbúgvingina.

## 10.5 Frámelding til próvtøku

Fyri at verða roknað/ur sum virkin, skal lesandi fara upp til próvtøku við fyrsta próvtøkuhøvi. Møguligt er at melda seg frá próvtøkuni, og skal hetta gerast skjótast gjørligt, og í øllum førum áðrenn próvtøku-tíðarbilið er byrjað. Lesandi, sum ikki melda seg frá próvtøku innan hesa freist, og heldur ikki møta upp til próvtøku, verða skrásett sum ”ikki staðið”, og telur hetta við í teimum trimum møguleikunum, tey hava at fara upp til próvtøku. Frámelding til próvtøku verður gjørd við at senda teldupost til skrivstovuna á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi.

## 10.6 Bólkaarbeiði

Ein partur av lestrinum kann verða skipaður sum arbeiði í bólki, tó eru ávís skeið kravd at verða einsæris. Fyri uppgávur, ið verða avrikaðar í bólki, er galdandi, at um lesandi taka seg úr einum bólki, ella bólkurin fer í tvíningar, so hava øll í bólkinum líkarætt til at brúka tilfarið, sum er framleitt í bólkinum.

---

[2] Nærri kunning um endurpróvtøku og sjúkrapróvtøku eru at finna á: Kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum, Nr. 85, 9. juni 2009. Sí Kapitul 5, § 31-33.

## 11. Góðskriving

Lesandi, ið hava staðið skeið á øðrum universitetum, sum eru á sama ella á hægri fakliga stigi, við sama fakliga innihaldi, og/ella kunna stuðla undir útbúgvingini sum heild, kunnu søkja um at fáa hesi góðskrivað, sum partar av útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum. Umsókn um góðskriving skal latast útbúgvingarleiðaranum, ið ger sær eina meting av, hvørt skeið frá øðrum lestrarstovni kann innganga í masterútbúgvingina í fólkaheilsu, og síðani sendir umsóknina víðari til forkvinnu/-mann í Lestrarráðnum á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi. Endalig avgerð um skeið verður góðskrivað verður tikin av Lestrarráðnum.

Søkjast kann so hvørt gjøgnum árið. Umsókn um góðskriving fyri ávíst skeið skal verða útbúgvingarleiðaranum í hendi í seinasta lagi 2 mánaðir áðrenn skeiðsbyrjan. Um lesandi ynskja at umsóknin skal verða viðgjørd áðrenn lestrarhálvan byrjar, er freistin hendan:

- Seinasta freist fyri várhálvuna: 1. oktober
- Seinasta freist fyri vetrarhálvuna: 10. januar

Nærri kunning um góðskrivingar, mannagongdir og oyðubløð eru at finna á heimasíðu Setursins.

## 12. Lestrarvist

Møguligt er at taka partar av útbúgvingini á øðrum universiteti sum skiftislesandi svarandi til valskeiðini á útbúgvingini (30 ECTS), ella í tann mun tað verður mett av útbúgvingarleiðara og játtað av lestrarráði, at skeið á øðrum universiteti kunnu innganga fyri kravd skeið á útbúgvingini. Áðrenn farið verður uttanlands at lesa, er neyðugt at søkja Lestrarráðið um undangóðkenning av góðskrivingini.

## 13. Kærur

Kærur um avgerðir í samband við próvtøku skulu latast dekaninum skrivliga við grundgevingum. Kærufreistin er seinast 2 vikur eftir at lesandi hevur fingið avgerðina at vita. Nærri kunning um kærumøguleikar eru at finna á heimasíðu Setursins.[3]

## 14. Aðrar leiðreglur

### 14.1 Farloyvi

Farloyvi verður søkt umvegis deildarskrivstovuna á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi. Eru ivamál í hesum høpi verður víst til lestrarvegleiðaran á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi.

---

[3] Nærri kunning um kærumøguleikar, sí:
Løgtingslóg nr 58 frá 9. Juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við Løgtingslóg Nr. 51. frá mai 2012, Kapitul 6a Kæra um próvtøku.

Kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum, Nr. 85, 9. juni 2009, Kapitul 8.

## 14.2 Útskriving

Velur tann lesandi at útskriva seg frá lestrinum, verður hetta gjørt við at venda sær til deildarskrivstovuna á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi, og útfylla oyðublað til hetta endamál. Gerast skal vart við, at um tann lesandi ynskir at byrja lesturin aftur, skal hann/hon søkja umaftur á jøvnum føti við onnur.

## 14.3 Samskifti

Samskifti við tey lesandi skal so vítt møguligt fara fram við hjálp av kunningartøkni (t.d. t-post, heimasíðu, Moodle, o.t.).

Masterritgerðin skal latast deildarskrivsstovuni bæði talgilt og í trimum eintøkum í pappírsformi.

## 14.4 Námsstig og arbeiðstyngd

Námsstig er ein roknieind fyri støddina av einum skeiði og arbeiðsbyrðuna hjá lesandi, og verða uppgjørd eftir evropeisku ECTS-skipanini (European Credit Transfer System skipanini). Hetta er ein felags skipan, sum ger tað lættari at flyta avrik millum lond og útbúgvingar. Námsstigini verða uppgjørd soleiðis:

- 1 ECTS svarar til 30 arbeiðstímar hjá lesandi – alt íroknað (fyrireiking + undirvísing + venjingar og próvtøka).

Flestu skeiðini telja 15 ECTS, og svarar hetta til 450 arbeiðstímar hjá lesandi til hvørt skeiðið. Ein fulltíðarlesandi hevur 30 ECTS hvørja lestrarhálvu, og skal tí rokna við at brúka umleið 900 arbeiðstímar hvørja lestrarhálvu.

## 14.5 Lestrarárið

Lestrarárið byrjar í viku 34 og endar í viku 25. Eingin undirvísing, sum er kravd í samband við útbúgvingina, fer fram uttanfyri hetta tíðarskeiðið. Tó er vanligt at summarskeið, seminar og verkstovur liggja uttanfyri formliga lestrarárið.

# 15. Treytir um broyting í námsskipan

Útbúgvingarleiðarin kann gera uppskot til broytingar í námsskipanini, og skulu hesar góðkennast av dekani og lestrarráði. Lestrarráðið kann eisini heita á útbúgvingarleiðaran og viðmæla broytingar í námsskipanini. Møguligar broytingar koma í gildi við lestrarársbyrjan.

Um størri broytingar verða gjørdar í námsskipanini, skulu lesandi hava møguleika at gera seg liðug eftir tí námsskipan, sum var galdandi, tá tey vóru innskrivað sum lesandi á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi, ella hava møguleika at fylgja einari skiftisskipan góðkend av lestrarráðnum.

Galdandi námsskipan skal verða tøk á heimasíðu Fróðskaparsetursins.